# Lættari at halda ólavsøkurøðu í ár

**– Fyri einum ári síðani skuldu vit fóta okkum í einari støðu, har stórt trýst var á alla skipanina, og tað var nervøsitetur um, hvat fór at henda, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann heldur, at vend nú er komin í búskapin, og tað ger tað lættari hjá honum at halda sína ólavsøkurøðu**

Eyðun Klakstein

Ólavsøkan bíðar fyri framman, og ein maður, sum hevur stóra uppgávu, er løgmaður, sum skal halda ólavsøkurøðuna, har politiska støðan verður gjørd upp og ætlanir fyri komandi ár verða lagdar fram.

Kaj Leo Johanensen skal í ár halda sína aðru ólavsøkurøðu, og hann heldur, at hon verður lættari at halda, enn tann fyrsta var.

– Optimisman, sum hevur verið, sæst nú aftur í tølunum, og tað er munandi lættari at halda ólavsøkurøðuna í ár, enn tað var í fjør. Tá peikaði alt niður eftir, bæði hjá okkum og londunum rundan um okkum, men nú er vend komin í, og vit eru á veg uppaftur, heldur Kaj Leo Johannesen.

– Fyri einum ári síðani skuldu vit fóta okkum í einari støðu, har stórt trýst var á alla skipanina, og tað var nervøsitetur um, hvat fór at henda. Røddir vóru eisini frammi um, at tað almenna skuldi spara nógvar milliónir, summi nevndu 400 ella 600 milliónir krónur, men eg eri sera fegin um, at vit ikki framdu umfatandi sparingar. Tað hevði verið ein vanlukka fyri samfelagið, um vit høvdu høgt bremsirnar í, tá kreppan var upp á tað ringasta.

### Meirinntøkur til at minka hall

ABC samgongan ætlar at steðga vøkstrinum í almennu útreiðslunun, og tað merkir í prinsippinum, at tað skal sparast. Er vandi tí ikki fyri, at tølini aftur fara peika skeiva vegin, tá tað almenna skal fremja sparingar í almenna rakstrinum fyri 2010.

– Vit hava sagt, at tað skal kosta tað sama at reka tað almenna í 2010, sum tað hevur gjørt í ár. Vit royna nevniliga at ansa eftir, at vit ikki spara ov ógvusliga í hesum tíðum. Útgangsstøðan fyri einari fíggjarlóg man sjáldan hava verið so góð, sum hon er hon. Vit hava ásett fíggjarkarmarnar, og øll landsstýrisfólkini vita, hvussu nógvar pengar tey hava at ráða yvir.

– Ein krepputíð ger, at tú passar enn betri upp á pengarnar, sum tú hevur at ráða yvir, og fyri tað almenna merkir tað rationaliseringar, og at vit sleppa undan dupultfunktiónum. Vit hava ikki ráð at hava dupultfunktiónir í føroyska samfelagnum.

Hóast inntøkurnar hjá tí almenna vuksu í fyrra hálvári, verða fíggjarkarmarnir teir, sum vórðu lagdir fyrr í ár.

– Meirinntøkurnar, sum koma í kassan, skulu brúkast til at minka um hallið. Tað kann væl verða, at tað kemur størri trýst á tað almenna um at brúka meira pengar, nú inntøkurnar vaksa, men vit skulu halda okkum til tann fíggjarkarm, sum er lagdur fyri komandi ár, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Stríðið er í miðlunum

ABC samgongan hevur verið merkt av nógv ósemjum millum samgongufólk, men hetta er ikki nakað, sum nervar løgmann nakað serligt.

– Stríðið millum fólk í anstøðuni tykist verða harðari í teimum stóru yvirskriftunum í fjølmiðlunum, enn eg upplivi tað innanhýsis, og eg kann bara staðfesta, at tá ið tey stóru málini hava verið fyri í løgtinginum, hevur stórur meiriluti verið fyri teimum, sigur Kaj Leo Johannesen.

– Men tað sigur seg eitt sindur sjálvt, at tá ið stórt trýst er á politikarar og skipanina, so er eisini nervøsitetur og stress hjá summum, og tá uppliva vit, at summir politikarar kenna seg noyddan at fara út alment og royna at gera seg populerar upp á bekostning av øðrum. Hetta er ofta somu politikarar, sum hava verið við í viðgerðini av málum og hava atkvøtt fyri teimum, og eg haldi, at fólk gjøgnumskoða slíkt.

– Andstøðan roynir sjálvsagt at føra fram, at vit fáa einki burtur úr, men seinasta veljarakanningini vísti, at samgongan gekk fram við fleiri mandatum, og tá vildi eg mett, at fólk halda, at vit hava gjørt okkurt rætt, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Ólavsøkan skal eisini haldast

Hóast Kaj Leo Johannesen nú er Føroya løgmaður, roynir hann eisini at halda ólavsøkuna.

– Ólavsøkuhaldið broytist við aldrinum. Í nógv ár setti ítróttturin dám á mína ólavsøku. Eftir at eg havi fingið familju, hava vit ikki minst hugsa um, at børnini fáa eina góða ólavsøku, og nú eg eri løgmaður fylgja eisini nakrar skyldur við.

– Tað er ein stór og týdningarmikil uppgáva at halda ólavsøkurøðuna, og hetta er ein søgulig løta við nógvum traditiónum.

– Mær dámar væl at ganga millum fólk á ólavsøku, hóast tað kann taka sína tíð at koma lítlan tein í býnum. Og eg má siga, at fólk eru sera fyrikomandi og blíð, og eg havi ongantíð merkt nakrar óbehagiligitir á ólavsøku, sigur Kaj Leo Johannesen.

***– Mær dámar væl at ganga millum fólk á ólavsøku, hóast tað kann taka sína tíð at koma lítlan tein í býnum. Og eg má siga, at fólk eru sera fyrikomandi og blíð, og eg havi ongantíð merkt nakrar óbehagiligitir á ólavsøku, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður, sum hevur roynt at hildið eitt sindur frí upp undir ólavsøku***

*Mynd: Eyðun Klakstein*